Oxford Street:

# Gøtan við møguleikunum

**Nógvir føroyingar fara av landinum á hesar sokallaðu "shopping-túrarnar", og her er London sjálvsagt ein góður møguleiki. Tá føroyingar fara til London, leita teir sær ofta inn á Oxford Street, sum er gøtan við øllum møguleikunum. Tað er sjáldan, tú kemur tómhentur heim haðani**

SUMMARKAPPINGIN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Oxford Street er veruliga gøtan við møguleikunum. Har fæst snøgt sagt alt frá dýrum merkisvørum til teir bíligaru handlarnar, har tú kanst keypa í tímavís uttan at brúka serliga nógvar pengar*

London er ein stórbýur við alskyns møguleikum, og hesin býur er eisini blivin eitt alt størri ferðamál fyri ferðandi úr Føroyum. Til tíðir skipar ferðavinnan fyri túrum til London, og hesum tilboðum taka vit aloftast ímóti við opnum ørmum, tí nú hava vit møguleika at fara til London at slappa av í eina viku.

Tíðin í London verður tó ikki bert nýtt til at slappa av, tí vit hava eisini eina ávísa trongd, sum sigur okkum, at vit vilja brúka eitt sindur av pengum, tá vit nú einaferð eru farin av landinum, og her er Oxford Street tann stóri møguleikin hjá okkum. Her fæst alt millum himmal og jørð – alt frá dýrum merkisvørum til teir meir bíligu handlarnar, har tú kanst ganga inni í tímavís og keypa uttan at brúka serliga nógvar pengar.

## Lættur vegur til Oxford Street

Tað hendir ofta, at fólk ikki kenna vegin, tá tey ganga og mala í einum stórbýi sum London. Tey ganga við einum korti í hondini og mugu alla tíðina hyggja niður í hetta góða kort fyri at finna vegin fram.

London er tó kendur fyri sína góðu og gomlu undirgrund, og hetta er uttan iva lættasti vegur fram, um ein vil ferðast runt í býnum. Tað er nevniliga eisini lætt at koma inn á Oxford Street við undirgrundina. Tú spyrgt bara okkurt av hjálparfólkunum á undirgrundsbanunum, hvussu tú sleppir til Oxford Circus, sum er undirgrundsbanin mitt á Oxford Street. So setur tú teg í tokið, og lítla løtu seinni stendir tú mitt á Oxford Street og sært yvir á ein av kendastu handlunum, Top Shop.

## Alskyns handlar

Tær noyðist ikki endiliga at taka undirgrundina til Oxford Street, tí til ber eisini at ganga til gøtuna við øllum møguleikunum. Tað tykist kanska lætt at siga, at Oxford Street hevur allar møguleikar. Tað hevur hon kanska ikki, men um tú ætlar tær at keypa nakað, so er heilt sikkurt, at hetta er at fáa á Oxford Street.

Føroyingar hava ofta lindi til at fara inn í H&M handlarnar at keypa, og hesum hava tey eisini møguleika fyri á Oxford Street. Har eru fleiri av hesum handlunum, og her kann man keypa eina ørgrynna uttan at skulu gjalda tað heilt stóra. Tað er nevniliga sera bíligt í H&M.

Ein onnur bílig keta er eisini inni á Oxford Street, og her er talan um Top Shop, sum liggur beint við Oxford Circus, um tú skuldi tikið undirgrundina. Her fæst eisini eitt stórt úrval av klæðum umframt skógvar í hópatali, so eitt er sikkurt. Tær nýtist ikki at fara til London at keypa fyri stórar peningaupphæddir, tí minni dýrir handlar finnast eisini á Oxford Street.

Oxford Street hevur tó eisini eina ørgrynnu av øðrum handlum. Har eru stórir handilsbygningar, ítróttahandlar, og nógvir hadlar, sum selja merkisvørur. Og so eru skógvahandlar á mest sum hvørjum horni. Eingin ivi er um, at møguleikarnir eru óendaligir og Oxford Street, og tú mást nýa meir enn ein dag í býnum, um tú skalt klára at ganga ígjøgnum alla gøtuna.






www.banisi.fo

Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600,
Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari